# Postverk Føroya hevði góðar 4,2 mió kr í avlopi



*Samlaðu inntøkurnar hjá Postverki Føroya í fjør vóru á leið á sama støði sum í 2004*

**Hósdagin 6. apríl 2006 hevði P/F Postverk Føroya aðalfund. Hetta er fyrsti aðalfundur eftir, at felagið varð stovnað í desember 2004**

POSTVERK
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosiaurin.fo*

P/F Postverk Føroya yvirtók virksemið hjá Postverki Føroya 16. desember 2005 við virkna frá ársbyrjan 2005.

Á aðalfundinum var sostatt fyrsti ársroknskapurin hjá felagnum lagdur fram, verður gjørt greitt í tíðindaskrivi.

Úrslitið áðrenn avskrivingar var 12,1 mió. kr. Eftir avskrivingar uppá góðar 3,5 mió. kr. var talan um eitt úrslit uppá góðar 8,5 mió. kr. Tá fíggjarpostar og óvanligar útreiðslur eru tiknar við, var úrslitið áðrenn skatt góðar 5,2 mió. kr. Eftir skatt er talan um eitt ársúrslit uppá góðar 4,2 mió. kr.

Samlaðu inntøkurnar vóru áleið á sama støði sum í 2004.

Inntøkurnar av brøvum, pakkum og filateli vóru nakað hægri, meðan munandi minking var í inntøkunum av bløðum og peningasendingum. Ein ávís minking hevur eisini verið í inntøkunum av adressuleysum sendingum.

Postverkið vinnur sær áleið 90 % av inntøkunum á økjum, har skyldistænasta er áløgd felagnum.

Leiðslan metir, at úrslitið fyri 2006 verður á nakað sama støði sum í 2005.

Á aðalfundinum var nevndin afturvald. Tey, ið manna nevndina eru: Jan Danielsen, formaður, Brynhild Setberg næstformaður og Ben Arabo. Nevndarlimir valdir av starvsfólkunum eru Áslak Tausen og Korinta Jarnfoss, ið komu í nevndina eftir aðalfundin.

# Norðurlendskar keiputekningar á framsýning i Havn

**Kendir teknarar úr Danmark, Íslandi, Noregi, Álandi og Føroyum fara frá 22. apríl at geva innlit í ta speirekandi og skemtiligu listagreinina, sum seinastu tíðina hevur elvt til altjóða kjak. Hetta verður í Havn, har framsýning letur upp leygardgain 22. apríl**

TEKNARAR

Norðurlendski Mentanargrunnurin stuðlar framsýningini við 100 000 krónum.

Sjeyti ára føðingardagurin hjá kenda føroyska skemtiteknaranum, Óla Petersen, verður hildin við eini sermerktari framsýning í Norðurlandahúsinum í Havn.

Umframt at heiðra føðingardagsbarnið er endamálið at vísa, at blað- og keiputekningin er týdningarmikil liður í tí samfelagskjaki, sum er ein fortreyt fyri demokratinum. Umráðandi er eisini at seta fokus á blað- og skemtitekningina sum listagrein.

Vikuna undan framsýningini verða workshops í gamla, vakra handilshúsinum hjá Ryberg, har luttakandi teknarar fara at gera aktuellar myndir frá almenna lívinum í Føroyum. Hesar verða eisini at síggja á framsýningini.

Norðurlendsku luttakararnir eru Jørn Villumsen, Claus Seidel, Annette Carlsen, Roald Als og Bob Katzenelson úr Danmark, Finn Graff úr Noregi, Sigmund Jóhannsson (Siggi) úr Íslandi, Jan Nordlund úr Álandi og sjálvandi Óli Petersen sjálvur. Umstríddar blaðtekningar verða sýndar fram, og kjakast verður um tær, í Miðlahúsinum í hesi workshop-viku.



*Sjeytiára føðingardagurin hjá keiputeknaranum á Sosialinum, Óla P verður hildin við eini serstakari framsýning í Norðurlandahúsinum*

Sandoyar Sýslu Ferðalag og Kunningarstovan:

# Eru aftur virkin



*Kunningarstovan á Sandi er nú aftur virkin*

**Sandoyar Kunningarstova og Sandoyar Sýslu Ferðalag skipaðu fríggjadagin 7/4 fyri móttøku í hølunum, sum Kunningarstovan húsast í. Hetta tí at nýggjur leiðari er settur í starv í Kunningarstovuni, sum umboðar alla sýsluna, Sandoy, Skúvoy og St.Dímun**

KUNNIGARSTOVA
*dagfinn@sosialurin.fo*

Kunningarstovan hevur verið stongd vetrarhálvuna, og tí er tað bara gott at hon nú umsíðir er latin uppaftur. Nýggi leiðarin eitur Anja Sandoy, sum býr á Sandi, verður boðað frá í tíðindaskrivi.

Sandoyar Sýslu Ferðalag og Kunningarstovan skipa m.a. fyri regluligum gongutúrum fyri limir felagsins. Hvønn mikudag kl. 20.00 verður gingið regluligar túrar ymsa staðni í oynni, hetta eru meir at rokna sum motiónstúrar: »Gakk fyri at halda teg í gongd«. Fysti túrurin var gingin seinasta týskvøld, hetta tí guðstænasta er mikudag í føstu, og fólk vóru væl møtt upp til túrin.

23/4 skipar felagið og Kunningarstovan fyri gongutúrinum: "Av Sondum inn í Dal" og er hetta ein túrur sum er vælegnaður til børn eisini.

Gingið verður eftir vegnum Traðarmegin, ímeðan Jóannes Jóhannessen, bóndi, greiðir frá um gamlar gøtur og annað áhugavert. Eftir túrin hava tey luttakandi møguleika at fara í Texas at fáa sær ein góðan bita at eta.

Næsti túrur verður gingin í Skálavík Kristihimmalferðardag. Tá verður Bjarni Dalsgaard, Bjarni á Mølini, ferðaleiðari. Gingið verður av Skálhøvda undir Heiðafjalli oman til Skálavíkar. Eftir henda túrin verður borðeitt við drekkamuði og pannukøkum niðri á Keldu.

Aðrir túrar sum felagið fer at skipa fyri í summar verða m.a. túrar til

Stóra Dímun og til Skúvoy.

Kunningarstovan hevur leingi arbeitt við at fáa heimasíðuna hjá felagnum at koyra, www.visitsandoy.fo Har liggur nógv tilfar um túrar, húsaútleigan, bygdirnar í oynni og annað forvitnisligt tilfar.

Heimasíðan er nógv vitjað av fremmandafólki, sum ætla sær at leggja leiðini til sýsluna. Eisini liggur ein tíðindatænasta inni á heimasíðuni við teimum nýggjastu tíðindunum innan ferðavinnu og annað viðkomandi.